# 10.000 litrar av olju tiknir upp

**Dálkingin av Havnarvág er munandi størri enn fyrst væntað, 10.000 litrar olju eru tiknir upp av vágni. Garnarskipið Nim eigur í øllum førum part av dálkingini, men hvussu stóran part, veit reiðaríið ikki at siga**

UMHVØRVI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


*Oljan fleyt fríggjadagin tjúkk um alla Havnarvág*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Uppruddingin eftir umfatandi oljudálkingina av Havnarvág gongur sambært innsatsleiðaranum hjá Tórshavnar sløkkilið væl. Sløkkiliðið hevur higartil tikið 10.000 litrar av reinari olju upp, so dálkingin var munandi størri enn mett var av fyrstan tíð.

Greitt er, at garnaskipið Nim, eigur ein part av dálkingini. Men sambært reiðaranum Gudmundi Mortensen, so eiga teir ikki alla oljuna. Meðan skipið lá við bryggju í Havn, fleyt olja yvir umborð og rann á sjógv. Spurdur um, hvussu stóran part av dálkingini Nim eigur, sigur Gudmund Mortensen, at tað veit hann ikki.

### Ikki eftirmett enn

Gudmundur Mortensen viðgongur tó, at meistarin á Nim veit, hvussu nógv olja var í skipinum, áðrenn lekin hendi, og teir tí hava møguleika at staðfesta, júst hvussu nógv er farið fyri borð. Men hann vísir á, at reiðaríið hevur ikki enn eftirmett hendingina saman við meistaranum, og hann kann tí ikki enn siga hvussu nógva olju, skipið hevur mist.

Fríggjadagin metti sløkkiliðið, at munandi minni av olju, eini 2.000 litrar vóru farnir á sjógv, og longu tá varð sagt frá Nim, at teir ikki áttu alla oljuna.

Folk hevur boðað sløkkiliðnum frá, at tey hava sæð olju á sjónum, longu áðrenn Nim kom at bryggju, og hetta gevur ábendingar um, at fleiri keldur kunnu vera til dálkingina.

Heilsufrøðiligastarvsstovan hevur tikið royndir av oljuni við Eystaru bryggju, í Vágsbotni og við Skinnaraskerð fyri at sammeta hana við oljuna umborð á skipum, ið kunnu hava staðið fyri dálkingini.

### Menniskjaligur feilur

Talan er sambært reiðaranum hjá Nim um ein menniskjaligan feil, ið er orsøk til oljulekan, men hann hevur ikki hug til at siga meira um orsøkina til lekan. Gudmund Mortensen sigur, at trupult er at gera naka fyri, at heilt beina fyri tílíkum feilum, men at teir sjálvandi fara at tosa við manningina.

Gudmundur Mortensen vísir á, at nýggj skip eru bygd til at taka ímóti olju, ið flýtur yvir, men at soleiðis er ikki umborð á Nim, ið er ein eldri garnabátur.

Um orsøkina til, at teir umborð á Nim ikki sjálvir boðaðu myndugleikunum frá um dálkingina beint tá óhappið hendi, sigur Gudmund Mortensen, at teir ikki vóru varðir við lekan fyrr enn um morgunin.

Í blaðnum mikudagin

**Sosialurin fer aftur um politisku flokkarnar**

Nú stundar móti løgtingsvali, sum í seinasta lagi verður 19. januar, fer Sosialurin undir eina nýggja greinarøð um politisku flokkarnar.
Tað er ein av okkara mætastu samfelagsfrøðingum og politisku viðmerkjarum, Jógvan Mørkøre, sum skrivar greinarøðina ið byggir á samrøður við floksformenninar fylgt upp við einum søguligum yvirliti yvir einstaka flokkin. Fyrsta greinin var í blaðnum mikudagin, og onnur greinin skuldi koma í blaðnum í dag, men orsakað av forfalli, er hon útsett til mikudagin.

**Sum uppfylging til greinarøðina fer Sosialurin at skipa fyri Trapputingi og orðaskifti í Miðlahúsinum seinnapartin í september**





## Hetlendingar til Føroyar at kunna seg um undirsjóvartunlar

KUNNINGARFERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í næsta mánaði kemur ein tór sendinevnd úr Hetlandi til Føroya at kunna seg um, hvussu føroyingar hava bundið landið saman við undirsjóvartunlum.

Miðvísa arbeiðið í Føroyum hesi seinastu árini at binda landið saman við undirsjóvartunlum, hevur vakt ans í Hetlandi.

Ansurin er so stórur, at í næsta mánaði kemur ein níggju manna stór sendinevnd úr Hetlandi til Føroyar at kunna seg um undirsjóvartunlar.

Eisini Hetlendingar royna at samanbinda landið, men higartil hava teir mest hugsað um brýr og seinastu árini hevur landið næstan verið í tvíningum um eina brúgv, sum tosað hevur verið um at gera tvørtur um havnina í Lerwick til Brassay, sum er oyggin beint uttanfyri Lerwick.

Men teir hugsa eisini um fast samband ímillum aðrar oyggjar og hetlendska meginøkið

Fyri at fáa nakað nýtt upp í kjakið, koma hetlendingar til Føroya á kunningarferð og teir vilja vita um undirsjóvartunlarnir, sum eru gjørdir í Føroyum, er nakað, tey kunnu brúka í Hetlandi.

- Vit kundu eins væl farið onkra aðrastaðni, eitt nú til Noregs, men vit hava gjørt av at fara til Føroyar, tí tær eru eitt lítið oyggjaland, akkurát sum Hetland, sigur Allan Wishart við Shetland News. Allan Wishart er stjóri í ZetTrans, sum er ein hetlendskt flutningssamtak.

Hetlendingar hava sum fyrimynd teir føroysku tunlarnir, sum gera fjarskotnum bygdum tættari samband við meginøkið og á Føroyaferðini vilja teir hava at vita, hví føroyingar hava valt tunlarnar framum brýrnar.

Teir vilja eisini hava at vita, hvørjum støði, føroysku tunlarnir eru á.

- Tunlarnir hava verið eitt munandi framstig og hevur givið nógv lættari atgongd til almennar tænastur, eitt nú útbúgving, frítíðarítriv og heilsuverk.

- Gott ferðasamband hevur avgerðandi týdning, sigur Allan Wishart við Shetland News.

Í Føroyum er endamálið at síggja so nógvar tunlar sum gjørligt og at tosa við avvarðandi politikarar og verkfrøðingar, sum hava verið við í arbeiðnum.undirsjóvartunlum tí kanska er hetta nakað, eisini teir kunnu brúka .

## Stjórin í Skipaeftirlitinum sagt upp

**Óli Hans Hammer Olsen takkar fyri seg tann 1. desembur**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*


*Stjórin í Skipaeftirlitinum, Óli Hans Hammer Olsen, leggur nú frá sær og ta næstu tíðina skal hann onki hava við skip at gera, sigur hann*

Tað er nú greitt, at Skipaeftirlitið skal hava nýggjan stjóra.

Óli Hans Hammer Olsen, sum hevur verið stjóri á Skipaeftirlitinum frá tí at tað varð yvirtikið fyri seks árum síðani, hevur gjørt av at siga seg úr starvi frá 1. desember at rokna.

Men hann klamsar ikki við hurðinum nú hann fer og uppsøgnin hevur onki við ónøgd at gera.

- Hetta er ein avgerð, eg havi hugsað bæði væl og leingi um, sigur hann.

Hann vísur á, at hann hevur altíð hildið, at fimm ár í einum almennum leiðarastarvi eru nóg mikið, tí tað er strævið. Men nú hevur hann verið stjóri á Skipaeftirlitinum í seks ár.

- Og tí ið eg sum almennur stjóri fari at hugsa um at slaka av, er tíðin komin at gevast og at lata frískar kreftir sleppa framat.

Annars hevur honum dámað sera væl á stovninum og starvið hevur verið avbjóðandi.

- Men skuldi ein nýggjur stjóri fingið brúk fyri onkrum upplýsingum, verið eg saktanst til taks til tað, leggur hann afturat.

Hann sigur, at tíðin er ikki búgvin til at avdúka, hvat hann nú fer at gera – men tað hevur onki við skip at gera, leggur hann afturat.